# Hvør vann skemtiligu kappingina um at vetrarfriða Kollafjørð?

Kappingin var henda:

**"Ítøkiligur býráðs-politikkur**

**Havnarmaðurin við kollfirðingin:** Hvat er títt hægsta ynski, at nýggja býráðið skal fremja?

**Kollfirðingurin:** At Kollafjørður verður vetrarfriðaður.

**Havnarmaðurin:** Hvat er tað, at vetrarfriða Kollafjørð? Meinar tú, at ongin haruskjóting skal verða í Kollafirði um veturin?

Her eru nøkur av svarunum, fólk í Havn góvu, tá tey vórðu spurd.

Tað er at...
*- eingin skal kunna koyra ígjøgnum Kollafjørð um veturin*
*- eingin skal vitja Kollfirðingar um veturin*
*- eingin skal ganga í haganum í Kollafirði um veturin*
*- kollfirðingar skulu sleppa at búgva í frið í Kollafirði um veturin eisini*
*- eingin haruskjóting í Kollafirði um veturin*
*- kollfirðingar flyta úr Kollafirði um veturin, so bøurin kann fáa frið*
*- ongar politiskar broytingar verða í Kollafirði um veturin*
*- ongin úr øðrum bygdum sleppa til Kollafjarðar um veturin*
*- grundstykki ikki kunnu keypast í Kollafirði um veturin*
*- ikki er loyvt at koyra skjótt gjøgnum Kollafjørð um veturin*
*- næmingar úr Kollafirði fáa frí um veturin*
*- salt og sandur skal ikki koyrast á brekkurnar í Kollafirði, tí har skreiða børnini*
*- eingin skal ferðast til Kollafjarðar um veturin*
*- ikki er loyvt at byggja kavamenn í Kollafirði*
*- eingi skip skulu sleppa inn á Kollafjørð um veturin*
*- eingin turistar skulu sleppa til Kollafjarðar á vetri*
*- fólk kunnu einans koyra á sletu í Kollafirði um veturin*
*- Kollafjørður verður loystur frá Havnini um veturin*
*- Kollafjørður skal gerast til eitt náttúrureservat um veturin, so at vísindamenn kunnu koma til Kollafjarðar at kanna eitt løgið fólkaslag, soleiðis kann Kollafjørður gerast ein av leiðandi miðdeplunum innanfyri gengransking og tílíkt*
*- eitt stórt drívhús skal byggjast, soleiðis at kollfirðingar sleppa undan tí kalda vetrarveðrinum*
*- øll sum búgva í Kollafirði flyta til Havnar um veturin*
*- ikki er loyvt at ala laks á Kollafirði um veturin*
*- kollfirðingar skulu sleppa frá at arbeiða um veturin*
*- eingin kavarudding verður í Kollafirði um veturin*
*- øll í Kollafirði skulu í "hi"(vetrarsvøvn) um veturin*
*- kollfirðingar fáa frið fyri politikkarum um veturin*
*- klokkan skal ikki flytast í Kollafirði um veturin*
*- ongin protokollføring verður í skúlanum í Kollafirði um veturin*
*- tað bara er loyvt at byggja kavamenn í Kollafirði um veturin*



*- Kollafjørður skal steingjast av um veturin - eins og ein vetrarfriðarstaður*
*- kollfirðingar skulu sleppa at sova í friði um morgunin um veturin*
*- alt arbeiði í Kollafirði skal stegða um veturin*
*- allir bilistar parkera bilin og ganga ígjøgnum Kollafjørð um veturin*
*- náttarfriður skal verða í Kollafirði um veturin*
*- kollfirðingar skulu halda frí um veturin*
*- kollfirðingar verða fluttir til Suðuroyar um veturin*
*- vegirnir í Kollafirði ongantíð eru hálir av frosti um veturin*
*- havnarfólk ikki sleppa til Kollafjarðar um veturin*

Hvat heldur tú?

Vinningurin var lambskrov úr Kollafirði frá Rólvi Djurhuus, bónda."

***Rætta svarið er: At friða bøin í Kollafirði fyri seyði um veturin.***

24 sendu rætt svar inn. Skrivstovukvinnan Anna Djurhuus skipaði fyri dráttinum og rektarin Mads Winther dró aftur.

***Trygvi Thomsen, Sandvík*** vann og fekk eitt leskiligt ræst, føroyskt lambskrov frá Rólvi Djurhuus, bónda í Kollafirði.

2.ð ynskir Fróða tillukku og takkar øllum, sum hjálptu til at vetrarfriða Kollafjørð á lógligan hátt. Samstundis takkar 2.ð Rólvi Djurhuus, bónda, sum beinanvegin so dyggiliga fegin vildi stuðla kappingini.

Stóra tøkk

**2.ð á Føroya Studentaskúla**








# Fleiri oljufeløg við í 2. útbjóðing

**Hóast áhugin neyvan verður so stórur sum í 1. útbjóðing fyri fýra árum síðani, so er hugsandi, at eini 7 til 9 oljufeløg fara at lata umsóknir inn. Alt bendir á, at Statoil, ChevronTexaco og Dong verða nýggju lokomotivini á landgrunninum**

OLJULEITING ANALYSA
*Jan Müller*

Mikudagin 17. november er seinasti møguleiki at lata inn umsóknir til at leita eftir olju við Føroyar, til 2. rundu. Torført fyri ikki at siga ómøguligt er at fáa nakað at vita, hvørji feløg fara at søkja, men tað skilst, at fleiri feløg fara at søkja og fara vit at síggja hesi feløgini í Havnini komandi dagarnar. Hotellini í býuum hava fingið fleiri bíleggingar frá nógvum ymsum oljufeløgum.

Sosialurin hevur sett seg í sambandi við fleiri av feløgunum og Oljufyrisitingina, men eingin vil siga nakað. Út frá leysatíðindum og metingum ber kortini til at gera sær eina mynd av útbjóðingini. Lat okkum royna og koyra vit oljufeløgini og áhuga teirra fyri aðru rundu í tríggjar bólkar.

Fyrsti bólkur eru tey feløgini, sum longu hava boðað frá, at tey fara at søkja ella umhugsa tað alvorliga. Hesi eru: Statoil, ChevronTexaco, Føroya Kolvetni, Atlants Kolvetni, Dong og Geysir.

Annar bólkur eru feløg, sum ikki hava úttalað seg men sum kunnu hugsast at søkja, nú tey eru her frammanundan, og nú tað ikki er nakað krav at binda seg til at bora brunn. Hesi eru: Shell og Anadarco.

Triði bólkur eru so tey feløg, sum beinleiðis hava úttalað seg um, at tey fara ikki at søkja ella feløg, sum als ikki hava gjørt vart við seg ella sum hava verið ivandi: Hesi feløg eru: BP, ENI, Amerada Hess og BG.

So er eisini spurningurin, hvørji nýggj feløg kunnu hugsast at søkja:

Hesi eru: OMV, Total og ExonMobil.

Hvat kunnu so hesir upplýsingar og metingar brúkast til!

Eftir okkara metan fara eini 7 til 9 feløg at vera við í útbjóðingini. Hesi eru: Statoil, ChevronTexaco, Dong, Shell, Føroya Kolvetni, Atlantskolvetni, Geysir, OMV og møguliga Anadarco.

Neyvan fara øll hesi feløg at bjóða saman. Heldur er hugsandi, at tey fara at bjóða í ymsum samtøkum. Í hesum sambandi er rætt at hyggja eftir, hvørji feløg vóru við í 1. rundu, hvørji buðu saman og síðani hvørji feløg eru virkin hinumegin markið og hvørji buðu í seinastu bretsku runduni, hvør sær og saman.

Vit halda tað vera rættiliga sannlíkt, at tað fara at koma inn einar 5 til 8 umsóknir frá 7 til 9 feløgum. Hetta er væl minni enn til 1. rundu, men eisini náttúrligt, nú einki fund er gjørt. Økini, sum umsóknirnar fara at snúgva seg um, eru tey norðarlaga á landgrunninum. Tvs. væl norðan fyri sokallaða Gullhornið, har flestu ella øll loyvini vórðu latin í 1. rundu. Eisini kann hugsast, at onkur feløg hava søkt um teigar heilt har suðuri. Orsøkin til at vita peika á økini longur norðari á landgrunninum er tann, at trupulleikin í Gullhorninum og sum eisini varð staðfest av Bpstjóra í Norðurlandahúsinum fyrr í ár, er tann,at tað tykist sum um, at eingin kappi ella tak er í møguligum oljugoymslum. Tvs. at oljan er guvað ella runnin burtur. Metingarnar eru nú, at slíkir kappar ella tak eru meira sannlik í strukturum longur norðari. Hetta hava serfrøðingarnir hjá Oljufyrisitingini eisini gjørt sær stóran ómak at kanna og kunngera. Eitt nú boðaði Oljufyristingin frá á fundi á ONS oljuráðstevnuni í Noregi herfyri, at sannlíkt var, at góðar og stórar olju- og gassgoymslur vórðu longur norðuri á landgrunninum og her varð eisini mett, at keldurnar kunnu vera risastórar og var samanbering gjørd við risastóra Clairfeltið í bretskum øki.

Hyggja vit so aftur eftir 2. rundu og áhuganum fyri henni, so er væl hugsandi er, at feløgini, sum eru við í loyvunum hinumegin markið, har fund eftir øllum at døma eru gjørd, eisini fara at søkja hesumegin markið, saman og hvør sær. Tí kann roknast við, at eitt felag sum OMV, sum ikki hevur verið á okkara øki fyrr, men sum er við í loyvunum hinumegin markið, eisini verður við í 2. útbjóðing. Tvs. at vit fara kanska at síggja Statoil, ChevronTexaco, Dong og OMV í umsóknunum. Eisini fara vit helst at síggja Føroya Kolvetni í hesum umsóknum so ella so, út frá tí sannroynd, at felagið er so virkið á bretska landgrunninum og fekk sera nógvar teigar í bretsku útbjóðingini. So er spurningurin, hvat feløg sum Shell, Geysir, Atlants Kolvetni og Anadarco gera. Geysir, sum er mannað við fyrrverandi Sagafólki, hevur víst stóran áhuga fyri økjum longur norðari og inni á landgrunninum. Spennandi verður at síggja, hvørjar teigar felagið fer at søkja um og saman við hvørjum. Vit hava hoyrt lítið til okkara egna Atlants Kolvetni. Kann hugsast,, at gamli kenningur Saga, nú Geysir, hevur bygt brýr til føroyska oljufelagið?

Øll bíða vit spent til mikudagin, tá oljumálaráðharrin Bjarni Djurholm, vónandi fer at kunngera áhugan fyri 2. útbjóðing. At dylja tað sum mansmorð kann neyvan tæna nøkrum, tí bíða vit eftir komandi útmelding frá Oljufyrisitingini.

Sum skilst fer Oljufyrisitingin at arbeiða skjótt og væl við umsókunum, soleiðis at loyvini kunnu latast í janaur. Dagurin 18. januar hevur verið nevndur sum dagurin, tá loyvini verða latin.

## VIÐMERKINGAR

# Verandi samgonga vann valið

**Sjúrður Olsen**
*Býráðslimur*



Fyrst vil eg ynskja øllum tilukku við valinum, eisini Heðini Mortensen.

Og eina serliga tøkk til tykkum 506 í stuðlaði meg persónliga á valinum.

Verandi samgonga vann valið, ongin yvi um tað.Vit fingu ongantíð møguleika at skipa okkum tí Heðin Mortensen stakk bæði okkum og allar okkara veljarir í ryggin fyri egnan vinning, Heðin ætlaði ongantíð at skipa samgongu við okkum, tí áðrenn fundin hevði hann longu gjørt avtalu við Jógvan Arge um at hann skuldi gerast borgarstjóri.

Kl 00:45 valnáttina møttust Heðin, Høgni, Beata, Jan, Bjarti, Annika og eg sjálvur niðri á býráðnum. Har bleiv avrátt beinanvegin at taka Javnaðarflokkin uppí samgonguna, fyri at fáa eina breiða og sterka samgongu, men Heðin vildi fyrst sleppa at umráða hettar við flokkin hjá sær. Tað hildu vit vera fair nokk, og vit skrivaðu øll undir samgonguskjal og tóku í hondina á hvørjum ørðumog avtalaðu at møtast aftur seinrapartin kl 15:00 saman við Javnaðarflokkinum. Hvat Heðin gjørdi beint aftaná vita øll.

Ein kann siga aftaná, at vit vóru naiv. Tað haldi eg ikki vit vóru. Um tú skal ganga runt og mistrúgva fólki so ringt, verður ikki livandi. Eingin annar enn Heðin Mortensen hevði kunna funni uppá slìkt.

Nú roynir Heðin at geva Høgna skylduna fyri at hava gjørt avtalu við fólkaflokkin áðrenn valið. Hetta er eisini lygn. Tað var Heðin Mortensen sjálvur, sum kallaði Sambandsflokkin og Fólkaflokkin saman til fund at gera valbólk. Á tí fundinum avtalaðu vit, at um vit fingu meirluta á valinum,skuldi størsti flokkurin hava borgarstjóran og skuldu vit møtast á Býráðnum valkvøldið og soleiðis bleiv eisini gjørt.

Annars má sigast at verandi samgonga hevur fingið nógv á skafti á øllum økjum, persónssamansetingin hevur veri perfekt. Vit hava staðið saman, bæði í við- og mótvindi. Eg vil eisini takka tykkum fyri 4 góð og lærurík ár.

**Valið 2004.**

Tjóðveldi gjørdi eitt brandval. Tilukku við tí. Kortini óskiljandi, at tjóveldisflokkurin skuldi fáa slíkt rimmarval, tí tey hava sitið og grenja, og als ikki ført nakran konstruktivan politikk, kortini vera tey borin innaftur. Ruddingardagur, gjøgnumskygni, opinleiki og mangt anna vóru slagorðini hjá Tjóveldisflokkinum, og so valdi tey Heðin Mortensen til borgarstjóra. Slíkt vísur enn einaferð, at tað eru bara orð og ongin ryggur í hasum fólkinum.

Sambandsflokkurin gjørdi eitt minni gott val. Grundin er einføld, teir gloymdi øll hini valevnini, so at bara Heðini var at síggja á hvørjum pela og ´hvørjum garði. At maðurin hevur bæði verði varaborgarstjóri, formaður í Byggi og býarskipanarnevndini umframt Mentamálanevndini átti at gjørt, at skuldi fingi minst 1200 stemmur. Aftur har hava hini skylduna fyri eitt vánaligt sambandsval, sigur Heðin uttan hann sjálvur, sum bara hevur profilerað seg sjálvan og ikki flokkin til valið.

Javnaðarflokkurin gjørdi eitt betri val enn nakar hevði vænta, aftaná alt rokið í flokkinum.Vit gjørdu eitt gott samgonguskjal náttuna eftir vali saman við Javnaðarflokkinum, sum Katrin og Elin vóru nógv glaðari fyri, enn tað tær høvdu gjørt við Tjóðveldi og Heðin. Men nevndin í felaðnum havnaði hesum. Eg kundi spurt Bergur Dam um tað er hann, sum er fólkavaldur ? Hevur hettar naka við demokrati at gera.

Við hesum havi eg kanska fingi luft fyri tí stóra skuffilsi okkum hevur verði fyri. Tað einasta vit nú kunnu gera er, at vit gera eina breiða samgongu har allir flokkarnir eru við, og at vit tildømis velja Jógvan ella Leivur til borgarstjóra. Tí vit kunnu ikki velja slíkan ryggleysan orðloysing sum Heðin Mortensen til borgarstjóra í Høvuðsstaðnum.Til Heðin er at siga, at tað sum farið er fram, einki hevur við jura at gera, men heldur, hvar moralska marki hjá tær er, ella um tu hevur nakran moral yvirhøvur.